HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 28. september 2017 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún og Leivur Simonsen
Avboð: Bjørghild Djurhuus og Bogi Andreasen
Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Skrivarauppgávan í skúlastýrinum í Hoyvíkar skúla:
Skúlastjórin hevur eitt greitt ynski um, at varastjórin luttekur á skúlastýrisfundum sum skrivari. Hetta skal skiljast soleiðis, at varastjórin átekur sær skrivarauppgávuna, men er annars ikki ein partur av skúlastýrinum. Sambært Tórshavnar kommunu er hetta møguligt, um eitt einmælt skúlastýri tekur undir við hesum.
Niðurstøðan er, at Jens á Skipagøtu, varastjóri, verður við á komandi skúlastýrisfundum sum skrivari. Hetta verður einmælt samtykt.

Hoyvíkar skúli 40 ár:
Í samband við 40 ára føðingardagin hjá Hoyvíkar skúla varð skipað fyri eini samkomu við myndasýning mikudagin 27. september 2017. Skúladagurin varð eisini merktur av hesum, tí næmingarnir í øllum flokkum hjálptu til at skipa skúladagin og myndasýningina seinni á degnum.
Eisini gjørdu næmingarnir eitt listaverk, sum hongur í Pyramiduhøllini.
Afturmeldingarnar frá bæði næmingum og foreldrum hava verið sera jaligar.

Støðan viðv. skúlabygninginum:
Tosað var breitt um, hvussu man skal handfara málið viðvíkjandi umvælingum av bygninginum. Breið semja er um, at støðan er ótolandi og gongur í ov stóran mun út yvir gerandisdagin í skúlanum.
Jeanette Blaasvær setir seg í samband við Tórshavnar kommunu og greiðir frá sjónarmiðunum hjá skúlastýrinum.

Umstøðurnar kring fótbóltsvøllin:

Hans Jón Thomsen greiðir frá, at hann hevur sent Tórshavnar kommunu ein teldupost beint eftir seinasta skúlastýrisfund. Hann hevur ikki fingið nakað aftursvar.

Nýggja hegnið og girðingin rundan um fótbóltsvøllin er framvegis ikki sett upp.

Annars er eisini breið semja um, at hegnið rundan um skúlan generelt krevur ábøtur.

Lærarastovan og skrivstovuhølini:

Boð eru komin aftur frá Tórshavnar kommunu, at áheitanin verður tikin upp á komandi fundi um bygging/umvæling av Hoyvíkar skúla. Ymsir møguleikar verða umrøddir í mun til, hvussu man kann loysa trupulleikan. Aðrar stovur verða umrøddar.

Skrivstovuumstøðurnar koma eisini upp í hetta kjakið aftur.

Hans Jón Thomsen og Leivur Simonsen viðgera málið saman við starvsfólkunum á komandi fundi í Námsfrøðiliga ráðnum.

Ferðsluviðurskiftini vestan fyri skúlan:

Ein ferðsluvegleiðing skal skrivast til foreldur og næmingar.

Jeanette Blaasvær setir seg í samband við Ráðið fyri Ferðslutrygd um vegleiðing í hesum sambandi.

Samskifti við foreldraumboðini í flokkunum:

Felags foreldrafundir hava verið, og nøvnini á foreldraumboðunum skulu verða klár til heystfrítíðina, soleiðis at fundur millum foreldraumboðini í skúlastýrinum og foreldraumboðini í flokkunum kann ásetast. Fundurin verður hildin í viku 42.

Tað eru foreldraumboðini í skúlastýrinum, ið skipa fundin.

Árligi foreldrafundurin hjá skúlastýrinum:

Ætlanin er, at árligi foreldrafundurin hjá skúlastýrinum verður til várs ella í endandum á skúlaárinum.

Fundurin lokin kl. 18:35